# TILTØK

**Skótagudstænastur**
*Týskvøldið 22. februar*
*Havnar kirkja:* kl. 19 Skótagudstænasta, Jóannis Fonsdal
*Rituvíkar kirkja:* kl. 19, Skótagudstænasta, Meinhard Bjartalíð
*Skálavík:* kl. 19, Jákup R. Hansen

**Føstugudstænastur**
*Mikukvøldið*
*Vesturkirkjan:* kl 20, Meinhard Bjartalíð
*Gjógv:* kl. 19,
*Funningur:* kl. 20.30 Bergur Debes Joensen
*Norðskála:* kl. 19,
*Eiði:* kl. 20.30 Martin R. Jacobsen
*Skála:* kl. 20 konsert við Quattro Musica
*Glyvrar:* kl. 20, Emil Olsen
*Gøta:* kl. 20, Bjarni Bæk, dómpróstur
*Fuglafjørður:* kl. 20 Jógvan Fríðriksson
*Kollafjørður:* kl. 20, Lestur
**Hóskvøldið**
*Argja kirkja:* kl. 20, Jákup Reinert Hansen
*Christianskirkjan:* kl. 20 Inga Poulsen Dam. Kaffihugni aftaná í kjallaranum
*Selatrað:* kl. 20 Martin R. Jacobsen
*Sjóvar kirkja:* kl. 20 Jóannis Fonsdal
*Oyndarfjørður:* kl. 20 Sverri Steinhólm
*Miðvágur:* kl. 19 Marjun Bæk
*Rituvík:* kl. 19,
*Nes:* kl. 20.15 Emil Olsen
*Hósvík:* kl. 19,
*Hvalvík:* kl. 20.30, Uni Næs
**Leygarkvøldið**
*Havnar kirkja:* kl. 20 Ungdómsgudstænasta, Jóannis Fonsdal

**3. sunnudag í føstu**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12, Jóannis Fonsdal, altargangur
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein
*Gjógv:* kl. 12, messa Emil Olsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12 Jógvan Fríðriksson
*Vágur:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altarg.
*Sandavágur:* kl. 12, David Johannesen
*Fugloy:* altarg., Elsa funding
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
**Sunnukvøldið**
*Sandavágur:* kl. 18 Bergur Debes Joensen

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Týsdag hugsunardagur skótanna við gudstænastu í Dómkirkjuni kl. 19.00.
Mikudag kl. 15 Bøn. Barnaróddir venja kl. 17.30 og mennirnir samlast kl. 19.00.
Hósdaginkl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Leygardag verður Familjudagur við vitjan í fimleikarhøll og døgurða aftaná, byrja kl. 16.00. Prísur 15,- Tilmelding 421747 ella 312189.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Ólavur Guttesen, evnið er: »Hví lesa Orð Guds«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC, evnið: »Praktiskt bønarlív«. 1. partur v/ Fríðtór Debes, kl. 18 Møti við Tormund og Co.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn, ring 211067. www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 11.30 Samvera við drekka. Kl. 12 tilbiðjanarmøti, Reflex skipar fyri báðum møtunum. Barnaansing er á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni.
Kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18.
Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. www.katolsk.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Týsdagin kl. 17.00 Várgleði fyri børn.

**Meinigheitshúsið**
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími, Róm. 1, 18-32.
Mikudagin kl. 19 venur Meinigheitskórið. Kl. 19-20 Trúar-alfabet. Hvør er Gud, hvør er Jesus – og hvør eri eg? v/ Sverra Steinhólm
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagin: Foreldur og børn er útsett til leygardagin 12. mars kl. 9.30-12.00.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tom Skaale.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Týsdagin 22. feb. kl. 17 venur Barnakórið, kl. 19 Ungdómsskótar 9.-10. fl.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið Libanon**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 24. februar kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Saron, Vestmanna**
Í kvøld pakka vit klæðir til Rumenia hjá Oliver Hansen í Miðalsbrekku kl. 19.

**Saron, Haldórsvík**
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Elianu og Magnus Olsen. Verið hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj.
Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sjómanskvinnuringurin kemur **ikki** saman hóskvøldið.

**Samkoman Lívsins Orð**
*Saltangará*
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti.
Hósdagin kl. 18.30 møta Tim5 og Liljur, kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 »Syngið við« v/ luttøku úr Evangeliihúsinum í Havn.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman týskvøldið kl. 19.30.

**Salem, Tvøroyri**
Á møtinum í Salem týskvøldið kl. 20 tala Sveinur Petersen og Osvald Kjærbo. Øll eru hjartaliga vælkmin.

**Missiónsvika í Porkeri**
Missiónsvikan verður í Missiónshúsinum í Porkeri hesa vikuna:
Týsdagin kl. 20 Patrick de Neergaard, prestur, Margit Lisberg, Hvalba, endar.
Streingjakórið í Porkeri syngur.
Ónsdagin kl. 20 Kirstein Stórhamar, Trongisvági, Jacob Poulsen, Lopra, endar.
Streingjakórið í Porkeri syngur.
Tórsdagin kl. 20 Jónsvein Bech, prestur, Bergfríð Berg, Hvalba, endar. Kórið á Tvøroyri syngur.

**Esbjerg**
Føroyskt møti verður í Zions kirkjuni (lokali í kjallaranum) á Nygårdsvej 103 í Esbjerg leygarkvøldið 26. februar kl. 19.30 v/ Hera Elttør, trúboðara. Eftir møti verður kaffi o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 21. februar:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, landastrok, telving o.o. spøl. Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491.
**Ólavsøkuframsýning:**
Innsavnan av barnamyndum, lutum o.ø. frá 1920-45 til ólavsøkuframsýningina.
*Týsdagin 22. februar:*
kl. 10.00–11.30: Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Búsetingar í 19-20 øld. Erling Poulsen.
*Mikudagin 23. februar:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestir.
Tilm. 316491
kl. 13-17 Opið hús
*Hósdagin 24. februar:*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Enskt talumál, Ásmundur V. Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 25. februar*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 12.00: Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrafelagið Nón**
Vit koma saman í húsum felagsins týskvøldið kl. 19.30.

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld í húsum felagsins týskvøldið kl. 19.00. Anna og Marius Jacobsen úr Leirvík siga frá um ferð í Grønlandi. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Mánadagin 21. februar:*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagur 22. febr.:*
Boccia.
*Mikudagur 23. febr.:*
Prát, sangur og spurningar
*Hósdagur 24. febr.:*
Myndaveving frá áhugað v. Rannvu Gøte.
*Fríggjadagur 25. febr.:*
Opið hús

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 3320534 ella ein av nevndarlimunum.

**Tilhaldi Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mándagin 21. februar:*
Mogens Nielsen undirvísir í talvi. Onnur spøl eru eisini til taks.
*Mikudagin 23. februar:*
Boccia í virkinum á Sandi. Vit byrja kl. 14.00. Reyða lið spælir ímóti bláa liði.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan.**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 8 min. at ganga frá Hovedbanegården, 4 min. frá Føroyahúsinum.
Bussarnir 1A, 6A, 14, 15 og 28 steðga nærhendis.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995 ella Albin Johannessen, tlf. 32 88 68 79.
E-mail: pr@eliaskirkjan.dk
www.eliaskirkjan.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag.
Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

## V4-dráttur
**í drátti nr. 1576**
**19. februar 2005**

**Tølini:** 5 - 11 - 20 - 27 39 - 41 - 43 - 51 - 53 54 - 59 - 60 - 72 - 84 93 - 98

**Ein vinnari**
Snars. nr. 3013021, Tórshavn

**Eykavinningur**
Seðlarnir í hesum dráttinum luttaka eisini í eykaspælinum í februar, har vinningurin er 100.000 kr. Drigið verður leygakvøldið 26. februar.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## Brúdleyp
Leygardagin 2. apríl kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Sonja Tungá og Jónsvein Thomsen av Sandi. Vælkomst verður í Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, vera biðin at siga frá á tlf. 361532 ella 580075 áðrenn 15. mars.

## Silvurbrúdleyp
Mikudagin 23. februar hava hjúnini Nina og Niklái Nielsen, Saltangará, verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst leygardagin 25. februar kl. 19.00 á Sjókaféini í Runavík.